# Hans Erland í Brekkunum seksti



Hóast tað ikki er til at síggja, og onkur kanska hevur ilt við at trúgva tí, rundaði Hans Erland í Brekkunum, skúlastjóri á Felagsskúlanum á Oyrarbakka, tey sekti árini sunnudagin 11. mars.

Hans Erland er føddur í Hósvík, og er sonur Hans Petur og Judith í Brekkunum.

Hans Erland í Brekkunum kom til Eiðis sum nýklaktur lærari í 1964 og var lærari har fram til 1970, tá hann var eitt ár lærari á Venjingarskúlanum. Kom síðan aftur til Eiðis og var lærari á Eiði og á nýggja Felagsskúlanum á Oyrarbakka fram til 1974, tá hann varð settur sum fyrsti skúlastjóri á Felagsskúlanum.

Hans Erland í Brekkunum man kanska mest vera kendur um landið sum tónleikari og sangari. Hann hevur verið bæði orkestur og kórleiðari eisini.

Hans Erland var kórleiðari, ta tíðina Eiðis Sangfelag var virkið. Fyri ikki at gloyma hornorkestrið, Eiðis Ljómfelag, har hann eisini var primus motor stóran part av æviskeiðnum, orkestrið var virkið nú í seinna umfari. Tað er so, at hornorkestur við sama navni eisini hevur verið á Eiði fyri umleið einum mansaldri síðan.

Og við sínum tónleikaligu evnum, var eisini boð eftir honum sum urguleikara í kirkjuni. Bæði í Hósvík og á Eiði, har hann er búsettur, hevur hann javnan sitið við orglið.

Nógvir føroyskir sangarar munnu kenna Hans Erland í Brekkunum frá kórstevnum og øðrum slíkum tiltøkum bæði her á landi og uttanlands. Hann hevur verið virkin í hesum ítrivi sínum bæði so og so. Sum meinigur sangari og eisini sum leiðari á onkrari kórstevnu.

Nú er tað so, at á heimafrontinum verður hann ivaleyst hildin til eisini. Hans Erland er giftur Sonnu, f. Waagstein Johansen, úr Havn, sum eisini eigur eina av teimum heilt kendu sangrøddunum í Føroyum.

Men eisini sum tónasmiður og útsetari hevur hann roynt seg. Meira enn so. Nógvar eru útsetingarnar, hann til dømis gjørdi til Eiðis Ljómfelag. Einamest av føroyskum sangløgum, sum hornorkestrið spældi. Og eisini hevur hann gjørt løg sjálvur.

Fólk, sum hava luttikið í sang- og musiklívinum, hava kanska av og á rakt við eitt nótablað, har navnið Heib hevur staðið í ovara høgra horni. So hava kanska fleiri ikki hugsað annað enn, at hatta er helst einhvør týskari ella so. Men so er ikki. Tað er Hans Erland í Brekkunum.

Tað av hansara løgum, sum helst hevur verið oftast at hoyrt alment, man vera lagið til Eiðissangin hjá Óla Egilstrøð, sum av og á er at hoyra í Útvarpinum.

**ej**

VIÐMERKINGAR

# Himnaherjar

**Eilif Samuelsen**



Vit liva øll í søguni, um vit vilja tað ella ikki, men álítandi søga verður valla skrivað um okkara avrik, meðan vit sjálv eru uppi á døgum. Tað er teimum fáu givið at megna at broyta søgunnar gongd; men fleiri eru tey, ið tilvitað eru farin undir hesa astronomisku uppgávuna í tí fasta treysti, at tey megna hana. Ein kann ikki annað enn taka hattin av fyri slíkari sjálvkenslu. Oftast má ein kortini við sorg í sinni sanna, at hesir himnaherjar fyrr ella seinni koma raplandi niðuraftur á fasta grund.

Í Føroyum hava vit havt fleiri slíkar gjøgnum tíðirnar. Á tí politiska sjálvstýrisveinginum kenna vit fleiri. Teir hava allir gjørt eitt stórt og virðismikið arbeiði fyri síni søk, men tað, sum hevur verið felags fyri teir, hevur verið, at teimum hevur tørvað jarðsamband, teir hava ikki havt tað neyðuga tolið, sum skal til fyri at fylgja andadráttinum hjá gerandisfólkinum í landinum. Teirra avrik hava ikki verið nýtilig í gerandisdegnum, tí teir hava viljað drigið tíðina framum seg og framskundað tíðarinnar og menningarinnar hóast alt støðugu og jøvnu gongd frameftir. Fleiri onnur – og teirra millum sambandsfólk - hava tilvitað valt at flogið nakað lægri, men tey hava raðfest og gjørt tað verkliga politiska arbeiðið, sum fyrst og fremst hevur verið í samsvari við fólksins gerandisligu neyðsyn, og lagt minni dent á at nema teirra kensluliga hugaheim. Tað endaliga, høga stavnhaldið fyri tjóðina hava sambandsfólk ongantíð mist úr eygsjón. Tí alt kemur sum kunnugt til tann, ið tol hevur

Yrkjarar og skald eiga at sveima uppi undir vetrarbreytini fyri at síggja alt sub specie aeternitatis. Men teirra skaldaverk eru heldur ikki og skulu heldur ikki vera uppskriftir til gerandiskost. Tað er teirra framíhjárættindi og sjálvsagda uppgáva at ’bera okkum burt í annan heim’ og at ’røra okkara hjartastreingir’. Teir eiga at hava einkarrættin til tað. Tá ið politikkarar gera tað, so forføra teir fjøldina, og demagogi er altíð av tí ónda

Tað, sum vit hava verið vitni til hesi seinastu trý árini frá teimum ráðandi politikkarunum, hevur verið ein rein misskiljing og mistulking av tí mandati, sum ein minimalur meirluti av føroysku veljarunum litu teimum upp í hendur. Gamaní tosaðu teir um sjálvstýri undan valinum. Tað hava sjálvstýrisflokkarnir gjørt í hundrað ár undan hvørjum vali. Men samgonguskjalið, sum víst verður til sum til eina ófrávíkiliga grundlóg, er ikki skrivað fyrr enn eftir valið.

Eitt samgonguskjal er ein opportunistisk eftirrationalisering, har vallyfti søgd og hugsað verða toygd og tambað, tøvd og krympað, nú tingsessirnir eru tryggjaðir. Hetta er ið hvussu so er galdandi fyri fullveldisprojektið í samgonguskjalinum. Tí er tað eisini kollrent, og júst av teimum, sum skammleyst í trý ár hava hava lumpað sínar samgongupartnarar og vóru noyddir at lata gekkaskortarnar falla, nú fellan var um at klamsa . Tað eru ikki øll, sum eru samd í at halda, at Várharra skal hava havt ein fingur við í tí spælinum.

Vit fara óivað enn einaferð at ásanna, at tað sjálvræði, sum Sambandsflokkurin við sínum miðvísa politikki ikki slóðar fyri, tað mugu vit bíða leingi eftir.

# Unga Tjóðveldið fegnast um semjuna í landsstýrinum

**Tíðindaskriv**

*nga v i*

Unga Tjóððveldið tekur fult og heilt undir við ætlanini hjá Føroya Landsstýri um at yvirtaka øll málsøkir og niðurlaga heildarveitingina eftir einum skipaðum leisti, soleiðis at Føroya fólk hevur møguleikan at taka støðu til sína framtíð uttan at hava búskaparligar hóttanir hangandi yvir høvdið.

Unga Tjóðveldið fegnast eisini um at Føroya Løgting, saman við yvirtøkutilgongdini, byggir á og samtykkir, at Føroya fólk er ein serstøk tjóð við ómissandi sjálvsavgerðarrætti.

Unga Tjóðveldið ásannar, at nú ræður um hjá øllum flokkum í samgonguni at halda fast við ætlanina, og Unga Tjóðveldi mælir tískil til at lagdar verða til viks tær ósemjur og flokkadráttur sum tók seg upp í kjalarvørrinum á samgongukreppuni seinastu vikurnar.

# Føroysk vika í SMS

TÍÐINDASKRIV

Í døgunum 14.-17. mars fer SMS at gera vart við vanligu føroysku gerandisvørurnar, ið fáast til keyps í húsinum.

Í SMS hevur vika 11 fingið heitið Føroysk vika. Hesa vikuna fer SMS at leggja seg eftir at fáa vanligar føroyskar gerandisvørur undan skeppuni og fram í ljósið.

Føroyska vikan verður hildin á Torginum og í Miklagarði, samstundis sum alt húsið verður prýtt. Framsýningin á Torginum leutur upp mikudagin 14. mars kl. 10.

Fimm føroyskar fyritøkur, sum framleiða gerandisvørur, ið verða seldar í húsinum, fara at sýna vørur sínar fram á Torginum. Fyritøkurnar eru: Føroya Bjór, Kemilux, MBM, Fóm og Faroe Seafood.

Miklagarður, sum selur flestu av vørunum, fer í somu viku at hava serlig tilboð uppá ávísar vørur frá hesum fimm fyritøkum. Tilboðini verða galdandi meðan føroyska vikan er.

Allar dagarnir meðan føroyska vikan er opin, bjóða fyritøkurnar smakkroyndir á básunum frá kl. 10.00. Faroe Seafood bjóðar tó heitar laksarullur hvønn dag frá kl. 14 til afturlating, leygardag tó frá kl. 10-14.

Fríggjadagin 16. mars kl. 16.00 vitjar Kári Cool framsýningina. Hann bjóðar ymiksar mjólkaúrdráttir, Jolly, og annað til øll vitjandi.

Leygardagin 17. mars kl. 13.00 vitjar TrøllaPætur Torgið. Hann verður í básinum hjá MBM, har hann bjóðar plakatir til børnini.

Tiltakið á Torginum endar kl. 14 leygardagin 17. mars.

# Minningarorð um Almu Sikivat Andersen

**f. 28.01.1953 d. 13.02.2001**

Tað er ikki til at skilja at tú, Alma ikki ert ímillum okkum meira, tú sum hevði so nógv at geva okkum øllum, sum komu á tína gátt og hvar enn tú kom, vísti tú so nógvan kærleika til øll, tú vart saman við.

Øll hesi 16 árini, tú hevur stríðst við sjúkuna, sást tað ikki á tær, tú var altíð glað og í góðum lag, spurdi altíð eftir, hvussu hini høvdu tað. Spurd hvussu tú hevði tað, svaraði tú altíð, at tú hevði tað gott.

Eg eri glað fyri, at vit, sum grannar komu at kennast so væl. Saknurin verður stórur og ikki minst hjá tykkum Ole, Birthe, Fróði og Benthe, sum sita eftir við sorgini, nú kona og mamma er farin heim til Harrans, sum hon hevði givið sítt lív til og sum eisini er mentur at leiða, styrkja og troysta tykkum ígjøgnum hesa sváru tíð.

Ein dag skulu vit møast aftur har heima og vera saman í allar ævir í teimum bústøðum, ið Gud ger okkum til reiðar, sum elska Hann, har hvørki sjúka, pína, sorg ella grátur skal vera.

Friður verði við minninum um teg, góða Alma.

**Birgit**




DAGFØR TEG

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum

Sosialurin

HALT SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið **sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | | |
|---|---|---|
| **Nissan Micra 1.0** | Grønur, 3 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. | 76.000 |
| **Nissan Sunny 1.4 LX** | Blá gráur, 4 hurðar, árg. 1991, 125.000 km. | 42.000 |
| **Nissan Primera 1.6** | Player, vínreyður, 4 hurðar, árg. 1995, 99.000 km. | 98.000 |
| **Nissan Patrol 2.8 H/T T/D** | LX, Reyður, 3 hurðar, árg. 1996, 119.000 km. | 148.000 |
| **Peugeot 106 Diesel** | Bláur, 3 hurðar, árg. 1995, 90.000 km. | 75.000 |
| **Peugeot 406 ST 2.0** | Gráur, 4 hurðar, árg. 1999, 35.000 km. | 167.000 |
| **Opel Corsa 1.4i** | Sport 5sp. Reyður, 3 hurðar, árg. 1996, 67.000 km. | 60.000 |
| **Corsa Joy** | Gráur, 5 hurðar, árg. 1995, 60.000 km. | 68.000 |
| **Ford Escort 1.8 Diesel** | Blá gráur, 3 hurðar, árg. 1992, 135.000 km. | 37.000 |
| **Ford Mondeo 2.0 AUT.** | Grønur, 4 hurðar, árg. 1994, 138.000 km. | 78.000 |
| **Ford Orion 1,6** | Bláur, 4 hurðar, árg. 1991, 72.000 km. | 46.000 |
| **Opel Astra 1,6** | Beige, 5 hurðar, árg. 1996, 74.000 km. | 87.000 |
| **Opel Astra Club 1,6 16V** | Grønur, 5 hurðar, árg. 1999, | 130.000 |
| **Opel Astra ST. Car** | Bláur, 5 hurðar, árg. 1997, 122.000 km. | 85.000 |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** | Reyður, 3 hurðar, árg. 1998, 50.000 km. | 90.000 |
| **Opel Corsa 1.4 16V Swing** | Grønur, 5 hurðar, árg. 1997, 42.000 km. | 95.000 |
| **Opel Omega 2.5 V6** | Gráur , 4 hurðar, árg. 1996, 65.000 km. | 157.000 |
| **Peugeot 106 1.4** | Grønur, 5 hurðar, árg. 1998, 20.000 km. | 90.000 |
| **Toyota Carina 1,6 st. Car** | Reyður, 5 hurðar, árg. 1996, 40.000 km. | 115.000 |
| **VW Golf** | Grønur, 5 hurðar, árg. 1987, 84.000 km. | 45.000 |

Sosialurin

Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Toftild Alternativt Hår

NÝTT HÁR!





HOTEL HAFNIA (Loftið)
Leygard. 24. mars og
sunnud. 25. mars
frá kl.14.00 - 19.00

SJÓMANSHEIMIÐ
Í KLAKSVÍK
Mánad. 26. mars
kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

*Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum.*
*Við okkum hava vit snotuligasta úrvalið av hárkollum og parúkkum.*
*Vit hava einaumboðan av nýggjari japanskari tægr, sum er einastandandi slitsterk, og tískil serstakliga vælegnað til fólk við kropsliga hørðum arbeiði - til dømis fiskimenn, handverkarar og onnur.*
*Hárluturin hevur ótrúlig evni at halda hársniði, og verður ikki sleipin sum frálíður. Harumframt er hann sera vælegnaður til varandi áseting.*
*Og júst varandi áseting er serøki okkara. Lagdur verður ein tráður undir húðina, og síðan verður hárluturin fastgjørdur. Nú vaskar og greiður tú hárið, sum var tað títt egna. Ein léttur og fittligur máti at endurnýggjað hárið. Sjálvur avger tú alt um lit, snið, bygnað o.s.fr.*
*Legg til merkis:*
*Vit eru fremstu útvegarar og serfrøðingar Danmarkar tá umræður øðrvísi hár, so kom innar og hygg at tilfarinum...*

www. team.fo/BOEL LAYOUT



HENNING TOFTILD
Toftild Alternativt Hår

BUDOLFI PLADS 9 DK-9000 AALBORG
TLF: 98 10 32 11 FAX: 98 13 36 22
www.alternativt-haar.dk

i
Sosialurin







Vilja tygum við
Í Býin
- hvønn hósdag

Ynskja tygum at lýsa í teiginum Í Býin, so fyllið út henda lepan og sendið hann til Sosialin, boks 76, FO-110 Tóshavn
- ella Fax: 31 47 20

Tekstur